# Mentan er eisini tað vit eru felags um



Dánjal Vang, býráðslimur ynskti nýggja mentanarhúsinum góða eydnu

MENTANARHÚS
*Jan Müller*

- Kristindómurin, mentanin og vinnulívið – tó at tey kunnu tykjast so ymisk og mótstríðandi – eru hvør í sínum lagi og saman tríggir týðandi lunnar, sum bera okkara bygd. Skal bygdin og landið alt mennast, eru hesir tríggir lunnar avgerandi. Vit eru fá, men vit megna tað, vit vilja. Tað er hetta hús eitt dømi um segði Dánjal Vang, býráðslimur í Fuglafirði, tá hann vegna kommununa ynskti øllum sjónleikarafelagnum og øllum bygdafólkinum tillukku við nýggja mentanarhúsinum.

Dánjal Vang helt fyri, at mentan er at dyrka. - Fyri at fáa nakað gott burturúr, mugu vit dyrka, tað verið seg materielt ella andaligt. Dyrkar tú ikki tey andaligu virðini, stirðna tey.

Mentan eru virðir, ið eru dyrkað og framvegis mugu dyrkast fyri ikki at verða køvd segði Dánjal og vísti til yrking hjá Karsten Hoydal:

*»Men tú, sum arvar dyrkað lendi,*
*minst til hvør grønur teirur er*
*ein ogn, sum lívið í tær eigur,*
*tað veldst um teg, um bøur ber«.*

Dánjal vísti á, at okkara mentanararvur má dyrkast, men ov trongt er, um vit ikki eisini á mentanarliga økinum kunnu bróta upp úr nýggjum.

- Gomul mentan og nýggj virði nýtast ikki at vera í stríði við hvørt annað. Mentan er samskifti, og er tað, sum gevur tilveruni meining og innihald. Men mentan er eisini tað, vit eru felags um. Eins og aðrar tjóðir eru vit ósamd um nógv viðurskifti, um politikk og um hvussu vit skulu skipa okkum í okkara landi. Men við tað at vit hava ein føroyskan samleika, merkir tað, at vit hava nøkur ting, vit eru felags um, nøkur felags virði. Endamálið við einum mentanarpolitikki má verða at styrkja hesi virðini. Tað er altíð týdningarmikið, at fólk hava nakað at vera felags um segði umboðið fyri býráðið og helt fyri, at reka vit ikki ein konstruktivan mentanarpolitikk, og eru vit ikki fús at játta pengar til tað, ið mentanarpolitikkurin kostar, so gongur tað út yvir okkara samleika og felagsvirðir, og so fáa vit trupulleikar við okkum sjálvum sum tjóð. Hann vísti á, at í Fuglafirði hevur býráðið altíð stuðlað mentanini og vil gera tað framvegis. Og hann helt fram:

- Tað var myrkur um landið alt, tá ið fólk tóku seg saman og fóru undir at smíða hetta hús.

Betri at kveikja ljós enn at grenja um myrkrið, hava tey hildið, sum fóru undir hetta stóra tiltak. Tað, at øll hava tikið lógvatak ger, at vit hava fingið hetta snotuliga og vakra hús.

Býráðið hevur stuðlað og fer framvegis at stuðla Mentanarhúsinum.

Eg skal ikki nevna nøvn, men takka øllum teimum, sum hava hjálpt og stuðlað og verið við til at gera hetta hús liðugt. Má Mentanarhúsið verða til gaman og álvara fyri tað fólk, sum her býr og tey, sum koma at vitja. Hjartaliga tillukku.

SANSIR TEL 355 355

Kundarøktari til Kall

Av tí at ein av okkara kundarøktarum fer undir hægri lestur, verður søkt eftir evnaríkum og dugnaligum fólki til kundarøktina.

Er tú ágrýtin, góður at samstarva við og kanst arbeiða sjálvstøðugt, so er tað kanska tær, vit hava brúk fyri.

Arbeiðsuppgávurnar vera í høvuðsheitum
• søla til privatkundar
• hjálp og vegleiðing til kundar
• skráseting og avstemman av debitorum
• tilsetan av kundatænastum
• o.a. fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir við at arbeiða við kundum. Arbeiðið hevur skiftandi arbeiðstíðir, og neyðugt er, at tú kanst arbeiða um kvøldið.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning á einum arbeiðsplássi, ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum. Starvið verður sett skjótast tilber.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. juli 2002. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til Henny á Líknargøtu á telefon 202052.

Endamálið hjá Kalli er at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum og altíð veita ta bestu tænastuna fyri ein góðan prís.

kall

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

Orðið er títt



# Mugu bjóða betri karmar enn Havnin



Sálin í mentanarhúsinum í Fuglafirði, Niels Midjord, sum hevur teknað og verið um byggingina øll árini
Mynd Jan Müller

MENTANARHÚS
*Jan Müller*

- Um okkum dámar tað ella ikki, so er ein sterkur atdráttur at Havnini og miðstaðarøkinum. Og kemur oljan, verður hesin atdráttur ivaleyst uppaftur sterkari. Skulu vit tí hava nakran kjans at kappast við Havnina, so mugu vit kunna bjóða betri karmar enn Havnin kann.

Hetta er grundin til, at vit líka frá byrjanini hava sett nøsina høgt; ofta hægri enn bæði ráðini og evnini vóru til tók Niels Midjord, maðurin, sum hevur teknað nýggju mentanarhúsini í Fuglafirði, so ramliga til orðanna, tá hann annars lítillátin trein á pallin undir vígsluni leygardagin.

Niels Midjord vísit til orðatakið, at "Leingi er tað, ið væl skal vera". -Í hesum førum hevur í hvussu so er verið tíð til at hugsa loysnirnar ígjøgnum. Men sjálvt um hetta mangan hevur kenst drúgført, og at tað er ein Harrans lætti, at hetta nú er komið undir land, so hevur tað verið ógvuliga spennandi og læruríkt at fingist við, og eg vil nýta høvið til at takka øllum, sum hava verið við til at gjørt hetta projektið til veruleika. Hann takkaði eisini fyri tað stóra álitið, sum Sjónleikarafelagið hevur víst sær, at lata seg tekna húsið.

Niels Midjord helt fram: - Plagi at biðja um signing yvir arbeiði, um at tað er vert at signa, og í hesum førum man eg vera bønhoyrdur; tí øll, sum hava havt við húsið at gera, bæði ráðgevar, men serstakliga tey, sum hava bygt: Elementvirkið, handverkarar, elektrikarar, málarar og nevndar- og bygginevndarlimir hava gingið upp í arbeiðið við lív og sál. Tey eru komin við hugskotum og ábótum og hava bjargað frensum í tekningum. Soleiðis hevur arbeiðið í nógvum førum verið eitt teamwork, sum hevur gjørt, at húsið er blivið betri enn upprunaliga ætlað.

Heitari tú ert fyri onkrum, skjótari er at kóka yvir, og tað er meira enn so komið fyri, at hvøss orð eru fallin, kanska serliga í byrjanini. Men sum húsið hevur tikið skap og fólk eru farin at trúgva uppá at projektið kundi fullførast, hevur alt gingið næstan av sær sjálvum. Fari at biðja um umbering, um eg havi stoytt nakran, tað hevur ikki verið meint persónliga.

So er tað tað um hetta er vert at signa: Tí givið er, at húsið, sum tað nú stendur, ber nógvar møguleikar í sær, bæði til tað góða og til tað minni góða. Eg vil tí ynskja nýggja stjóranum hepna hond at reka húsið og styrkja tað góða umdømið, sum húsið longu hevur fingið, soleiðis at tað kann gerast ein mentanarmiðdepil, ikki bara fyri allar fuglfirðingar, men kanska fyri alla oynna við.

team85

Mini Cruise

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

til Bergens



Fráferð av Havnini mánamorgun kl. 8.30 við komu á Havnina mikudag kl. 15.00

Á ferðini verður skipað fyri bingo!

Í sølubúðunum umborð eru nógv góð tilboð!

úr bara 750,-



www.smyril-line.fo

e-mail: booking@smyril-line.fo

SANSIR TEL 355 355

Ein góður kjansur

Kall søkir skrivstovunæming

Kundi tú hugsað tær eina skrivstovuútbúgving í einari vinnu, sum støðugt er í menning og ávirkar gerandisdagin hjá okkum øllum? So hevur tú møguleikan nú.

Hjá Kalli er eitt lærupláss leyst at søkja til setan 1. august 2002.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi, eftir at einkarætturin er avtikin á telesamskiftisøkinum.

Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning á einum arbeiðsplássi, ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans og hava FHS-, HH-prógv ella líknandi.

Næmingurin verður settur sambært sáttmálanum hjá S&K og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Lærutíðin fyri næming við FHS-prógvi er 3 ár og fyri næming við HH-prógvi 2 ár. Í lærutíðini skal FHS næmingurin á handilsskúla í uml. 11 vikur og næmingurin við HH-prógvi í uml. 10 vikur samanlagt.

Byrjanarlønin fyri næming við 3 ára lærutíð er 8176,90 kr. og fyri næming við 2 ára lærutíð 8994,59 kr.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juli 2002. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

Endamálið hjá Kalli er at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum og altíð veita ta bestu tænastuna fyri ein góðan prís.

kall

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

Orðið er títt